Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Búskaparráðið og Landsbankin

Spurningar:

1. Hvørjar hugsanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi skipanini av Landsbanka og Búskaparráði, sum varð framd í 2021?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at varðveita verandi skipan ella møguliga at broyta hana?

Viðmerkingar:
Í 2021 varð skipanin við Landsbanka broytt, so Landsbankin gjørdist ein partur av fíggjarlógini, og tí ikki longur er heilt óheftur av politisku skipanini.

Samstundis varð við einari ætlan um at spara pengar eisini skipað soleiðis fyri, at nevndin fyri Landsbankan varð avtikin, so Búskaparráðið samstundis gjørdist Landsbankanevnd.

Allir hoyringarpartar í málinum í 2021 mettu, at talan var um broytingar, sum ikki vóru gagnligar, tí hesin spurningur um, hvussu skipanin hevur roynst, og um ætlanin er at broyta hana.

Á Løgtingi, 23. juni 2023

Eirikur í Jákupsstovu